DR1 mánakvøldið kl. 21.00



Gwen setir sær fyri, at hon skal læra órættvísa verjan, hvat rættvísi er fyri nakað

# Ein kvinna sær reytt

Tann, ið drap beiggja hennara, verður fríkendur í rættinum, tí verjin dugdi meira, enn gott var. Nú skal verjin sanna, hvat rættvísi merkir.

Tá George Saticoy kemur fram á, at makkari hansara ætlar at fremja tryggingarsvik við at brenna café'ina, sum teir báðir reka, í grungd, er hetta nakað, ið kostar honum lívi.

Makkarin, Damon, vil vera við, at drápið varð framt í sjálvverju, og saman við verja sínum, Merle Hammond, megnar hann eisini at sannføra rættin um, at so var.

Men systir George, Gwen, heldur ikki nógv hesum framferðarhátti. Størsta vápnið hjá verjanum var, at Georga varð lagdur undir bæði líkt og ólíkt, og hetta vil hon ikki finna seg í.

Ikki minst tá Damon samstundis selir søgu sína fyri millióna-upphædd. Tá hevur Gwen fingið nokk. Hon tekur verjan til gíðsla, uttan at hon kortini er heilt greið um, hvat hon skal nýta hetta til. Eitt er tó víst. Nú skal Merle Hammond læra, hvat rættvísi í veruleikanum merkir!

Tað er Tommy Lee Wallece, sum hevur leikstjórnað filminum. Babs Greyhosky skrivaði handritið.



Í rættinum verður George lagdur undir bæði líkt og ólíkt

# The Loretta Claiborne Story

3+ sunnukvøldið kl. 19.00

Camryn Manheim hevur leiklutin sum sosialráðgevin, Janet McFarland, í hesum hjartanemandi dramafilminum um ítróttarhetjuna, Loretta Claiborne. Loretta er brekað, og ikki fyrr enn hon er fýra ár, dugir hon at tosa og ganga.

Hetta ger, a thon á lívsleið síni noyðiast at vinna á hópin av forðingum. Ikki minst happingini, sum hon verður offur fyri í skúlanum og aðrastaðni, har hon ferðast. Óttan fyri hesum megnar hon tó at vinna á við at renna skjótari, enn nakar av hinum megnar.

Og tá sosialráðgevin, Janet McFarland, so nevnir ParaOlympisku leikinrar fyri henni, kemur Loretta av álvara á røttu hillina. Hon setir met oman á met, og samstundis gerst hon fyrimyndin hjá hópin av øðrum ungum í líknandi støðu.



Søgan um Loretta Cliaborne er søgan um veiku gentuna, sum at enda gjørdist fyrimyndin hjá hópin av øðrum ungdómum



Saman við sosialráðgeva sínum megnar Loretta at vinna á stórum forðingum, sum eru á lívsleið hennara